## Toskurin má víkja

Í mong ár hava bretar brúkt tosk til ta kendu máltíðina fish-and-chips, men teir bretar, sum keypa sær eina tílíka máltíð í dag og í framtíðini, kunnu als ikki vera vís í, at tað er toskur, sum tey eta. Bretskir fjølmiðlar skriva, at annar fiskur er komin inn á tann marknaðin, og at talan millum annað er um fiskaslagið pangasius, sum er alifiskur úr Vietnam. Orsøkinn er písmunurin. Fjølmiðlarnir skriva, at eitt kilo av toskaflaki kostar umleið 12 sterlingpund í Bretlandi, meðan eitt kilo av pangasius-flaki fæst fyri umleið sjey pund.



## Sjómenn harta Altingið

Fakfelagið hjá teimum ísloendsku sjómonnunum, Sjómannafélag Íslands, er sera misnøgt við, at Altingið gjørdi av at forða flogternunum hjá Icelandair at fara í verkfall. Flogternurnar skuldu fara í verkfall í síðstu viku, men eftir uppskoti frá stjórnini samtykti Altingið at seta forboð fyri verkfallinum. Felagið hjá teimum íslendsku sjómonnunum sigur í einari yvirlýsing, at fyri fakfeløgini hava sáttmálasamráðingar einki virði, tá arbeiðsgevararnir kunnu fáa stjórnina og Altingið at seta fakfeløgini til viks. Sjómannafelagið heldur, at Altingið skuldi skamma seg.

# Lønir og pensjónir skulu ikki hækka næstu árini

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum miðjar eftir, at lønirnar hjá teimum alment løntu skulu ikki hækka, tá ið lønarsamráðingar verða í heyst. Eydnast tað, fara pensjónir og lestrarstuðul heldur ikki at hækka**

LANDSKASSAHALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fyri at avmarkað hallið á fíggjarlógini, miðjar samgongan eftir, at almennu lønirnar, pensjónirnar og lestrarstuðulin skulu standa í stað næstu árini*

Tey næstu árini skulu hvørki almennar lønir, pensjónir ella lestrarstuðul hækka.

Tað miðjar javnaðarflokkurin nú samgongan telvar av lívsins kreftum um fíggjarlógina fyri næsta ár.

Tað upplýsti tingfólk og landsstýrisfólk hjá Javnaðarflokkinum á fundi fyri javnaðaráhugaðum í Havn í gjárkvøldið.

Tey staðfestu, at sostatt verður miðjað eftir, at sáttmálasamráðingarnar ímillum fíggjarmálaráðið og fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum í heyst, skulu føra við sær, at lønirnar standa í stað.

Hendir tað, verður avleiðingin, at pensjónir og lestrarstuðul og aðrar veitingar frá tí almenna, heldur ikki verða framskrivaðar.

Fólkaflokkurin hevur skotið upp, at ásea lønarsteðg við lóg, men tað vil Javnaðarflokkurin ikki hoyra talan um.

Kortini vil flokkurin ikki leggja upp fyri lønarhækkingum á fíggjarlógini fyri næsta ár

John Johannessen, politiskur formaður javnaðarfloksins, metir ikki, at hetta er at leggja seg út út sáttmálasamráðingar.

- Hækka vit lønarkarmin 2% á fíggjarlógini, er tað eisini at leggja seg út í samráðingarnar, tí so geva vit ábendingar um, at ein lønarhækking upp á 2% er tað, vit kunnu góðtaka.

- Enda samráðingarnar í heyst við lønarhækkingum, hóast endamálið er tað øvugta, verður tað tikið upp til ta tíð, sigur hann.

### Yvir 100 milliónir dýrari

Landsstýrismaðurin segði, at metingar siga, at næsta ár verður føroyska samfelagið yvir 100 milliónir dýrari at reka, enn tað er í ár.

Nakrar orsøkir til tað eru, at ellis- og røktarheim verða tikin í brúk og bara á teimum verða útreiðslurnar til lønir einar 25 milliónir næsta ár. Samstundis hækkar talið á pensjónistum.

Samstundis arbeiðir samgongan við eini meting, sum sigur, at næsta ár verða inntøkurnar hjá landskassanum 2% hægri enn í ár.

- Tað er ein sera varislig meting, tí Búskaparráðið metir, at vøksturin verður eitt vet størri.

Hinvegin ætlar hann, at næsta ár skulu útreiðslurnar á fíggjarlógini verða lægri, enn tær eru í ár, hóast raksturin verður góðar 100 milliónir dýrari. Tað merkir, at sparingar skulu setast í verk fyri minst 100 milliónir.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur, at tilsamans verður úrslitið, at hallið á fíggjarlógini næsta ár verður slakar 600 milliónir, ella 200 milliónir minni enn tað er í ár.

### Sparingar ella inntøkur

Spurningurin er so, hvussu hetta mál skal røkkast.

- Javnaðarflokkurin vil hækka inntøkurnar hjá landskassanum við tilfeingisgjaldi og avgjøldum og minka útreiðslurnar við nýskipanum í fólkaskúlanum, heilsuverkinum og við at niðurlagað sjómannafrádráttin.

Men hendan ætlan møtir stórari mótstøðu frá hinum samgonguflokkunum, serliga Fólkaflokkinum, sum vil spara seg burtur úr kreppuni.

- Javnaðarflokkurin vil eisini spara, men tað skal gerast við størsta varsemi, uttan at ganga vælferðartænastum ov nær, legði Jóannes Eidesgaard, dent á.

## Skulu betala eykaskatt av óvanligum vinningi

**Samgongan hevur nú slept ætlanin um at áleggja fiskiflotanum tilfeingisgjald. Afturfyri vil Jóannes Eidesgaard nú hava, at fáa reiðarar onkran óvanligan vinning, skulu teir betala eykaskatt av tí**

LANDSKASSAHALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fáa reiðarar óvanligan vinning av teirra virksemi, skulu teir betala ein eykaskatt av tí.

Tað er eitt uppskot, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt fyri samgonguna í eini roynd at minka hallið á fíggjarlógini.

Jóannes Eidesgaard dylir ikki fyri, at hann tekur undir við at reiðarar betala tilfeingisgjald fyri rættin til at fiskiríkidømið.

Tað kundi verðið gjørt við at stovna ein fiskidagamarknað, ella ein fiskidagabanka

Men tað við Fólkaflokkurin ikki hoyra talan um.

- Tí hava vit í fyrstu atløgu slept ætlanini um at áleggja flotanum tilfeingisgjald, viðgekk landsstýrismaðurin á fundi fyri javnaðaráhugaðum í Havn í gjárkvøldið.

Ístaðin vil landsstýrismaðurin hava samgonguna at semjast um, at hava reiðarar ein óvanligan vinning av tí, at teir hava atgongd til eitt avmarkað tilfeingi, skulu teir betala ein eykaskatt av tí, sum eitt slag av tilfeingisgjaldi.

Eitt dømi um ein óvanligan vinning kann eisini vera, at teir selja eitt skip fyri meiri enn tað er vert.

Men tað kann eisini vera vinningur, teir fáa av at fáa framíhjárætt til eitt avmarkað tilfeingi.

Vanligi partafelagsskatturin er 18%, men hava reiðarar óvanligan vinning, skulu teir betala ein skatt upp á 27% av honum.

Talan er sostatt ikki um at áleggja eykaskatt av feløgum, sum hava vanligan vinning av teirra virksemi.

# Ætla at senda føroyingum rokningar fyri 38 milliónir

**Fyri at minka um hallið á fíggjarlógini vil landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at skip og virki skulu betala 10 oyru í serligum oljuavgjaldi og hjá vanligum fólki verður eisini dýrari at fylla tangan á bilinum og bátinum**

LANDSKASSAHALL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Allir føroyingar skulu nú hava eina eyka rokning upp á 30 milliónir fyri at fylla holið í landskassanum.

Fyri at minka um hallið á fíggjarlógini ætlar landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at áleggja øllum eitt eyka oljuavgjald, sum tilsamans fer at geva honum 30 milliónir eyka í landskassan.

Tað upplýsti hann fyri sínum egnu veljarum á fundi fyri javnaðaráhugaðum havnarfólki í gjárkvøldið.

Hann segði, at hetta er ein partur av telvingini í samgonguni um fíggjarlógina fyri næsta ár.

Men hann legði afturat, at hetta er eisini eitt av málunum, sum samgonguflokkarnir eru ósamdir um.

### Eykagjald á hvønn litur

Jóannes Eidesgaard sigur, at hansara uppskot er, at nú skal eitt eyka oljuavgjald upp á 10 oyru leggjast á hvønn einasta litur av olju, oljuúrdráttum og bensini, sum verður selt í Føroyum.

Hetta skal bæði vera galdandi fyri skip, vinnulív á landi og vanlig fólk.

Fyri at fáa tað at glíða løttari niður, verður hetta ikki kallað oljuavgjald, men eitt CO2 avgjald.

Frammanundan betala húsarhald eitt oljuavgjald upp á 80 oyru fyri liturin.

Og samstundis sum ætlanin er at áseta eitt serligt oljuavgjald upp á 10 oyru fyrl liturin, er ælanin at lække avgjaldið til vanlig húsarhald niður í 70 oyru, so at tey ikki verða harðari rakt, enn tey eru nú, men koma at betala tað sama.

Hvørt ár verða einar 270 milliónir litrar av olju seldir í Føroyum og hetta fer at geva landskassanum eina eyka inntøku upp á 38 milliónir krónur, upplýsti Jóannes Eidesgaard.